**Ársfrágreiðing hjá Sjúkrarøktaretiska ráðnum 2017.**

Seinasta árið hevur serliga verið arbeitt við at tilrættaleggja Norðurlendsku Sjúkrarøktaretisku ráðstevnuna, sum varð hildin 14 og 15 septembur á Hotel Hafnia. Talið á luttakarunum var 27 og komu tey úr Grønlandi, Danmark, Svøríki, Noregi og Føroyum.

Felagsheitið fyri fyrilestrarøðina var "Small Scale society" smásamfelagið og fevndu fyrilestrarnir um hesi evnir:

- Føðidepressión – at granska í einum kenslubornum evni í einum lítlum samfelag.
- Kyn, umsorgan og relatiónir í einum lítlum samfelag.
- Etikkur í mun til "whistle blowing" í einum lítlum samfelag.
- Brúkið av tí humana genominum í heilsuverkinum: Himmal ella helviti?
- Krabbameinsviðgerð í Føroyum.
- Sjúklingaperspektivið á krabbameinsviðgerð.
- Sparingar í heilsuverkinum, sæð úr einum etiskum sjónarhorni.

Vitjað varð á Hvíldarheiminum Naina og á Listasavni Føroya har víst var runt. Um kvøldið var boðið til døgurða á garðinum í Kirkjubø. Byrjað var í kirkjuni har Petra Iversen sang kingosálmar og Jóhannis Patursson greiddi frá Kirkjubøarsøguni. Kvøldið endaði við at dansifólk úr Norðurstreymoyar dansifelag vístu føroysk dansispøl og at enda bjóðaði øllum uppá gólv.

Luttakararnir vóru á einum máli um høga støðið á fyrilestrunum, sum tey mettu seg hava fingið ógvuliga nógv burturúr, eins og tað mentanarliga íkastið vakti stóran ans og áhuga. Stevnan endaði við at Noreg bjóðaði til Sjúkrarøktaretiska ráðstevnu í septembur 2018.

**Dagføring av Sjúkrarøktaretisku leiðreglunum.**

Arbeiðið at dagføra Sjúkrarøktaretisku leiðreglurnar og gera tær meiri atkomuligar og brúkiligar fyri limirnar heldur fram. Hetta metir ráðið hava stóran týdning fyri at halda støðið og menna etiska partin í fakinum.

**Menna førleikar hjá limunum og gera ráðið meiri sjónligt.**

Ráðið fer framhaldandi at greina og viðgera etiskar tvístøður og seta hesar í Vøku og á heimasíðuna hjá felagnum. Ráðið hevur fingið onkrar fyrispurningar, men ynskiligt hevði verið at fingið fleiri fyrispurningar og tvístøður sum koma fyri í praksis, sendandi. Ráðið hevur eina T-postadressu etikkur@sjukrarøkt.fo har sjúkrarøktarfrøðingar nevndir ella ónevndir kunnu senda spurningar og tvístøður inn til ráðið. Ráðið metir tað hava stóran týdning at limirnir samstarva við ráðið og eru við til at gera truplar praksistøður sjónligar. Ráðið arbeiðir eisini við at skipa fyri fyrilestrum um etik fyri sjúkrarøktarfrøðingar.

**Nevndarlimir í Sjúkrarøktaretiska ráðnum.**

Valskeiðið hjá nevndarlimunum er hetta: Katrin Andersen forkvinna afturvald 2015-2019. Meta av Fløtum næstforkvinna afturvald 2017-2021. Birna M. Joensen skrivari 2015-2019. Marjun Thomsen afturvald 2017-2021. Beinta Kollslíð 2014-2018. Hildur við Høgadalsá tiltakslimur 2017.

Sostatt eru tað Beinta Kollslíð og Hildur við Høgadalsá sum standa fyri valið í 2018.

Hildur við Høgadalsá hevur fingið bjóðað sessin sum forkvinna í nýggja etiska ráðnum sum landsstýriskvinnan í heilsu- og innlendismálum Sirið Stenberg hevur sett á stovn. Hildur hevur játta at taka við sessinum.

Fyri ráðið

Katrin Andersen forkvinna.